# RAKSTRAR- FÍGGJAR- OG BYGGIÆTLAN

# FYRI

# 2008

nov. 2007

# Viðmerkingar

# til

# RAKSTRAR- FÍGGJAR- OG BYGGIÆTLAN

# fyri rakstrarárið 2008.

## INNGANGUR

Arbeiðið at tilevna uppskotið til rakstrar-, fíggjar- og byggiætlan fyri 2008 hevur serstakliga verið merkt av, at oljuprísirnir hava verið skjótt hækkandi í seinastuni og eru við byrjan av november 2007 tað hægsta nakrantíð í søguni hjá SEV.
Samstundis benda seinastu hagtølini fyri elframleiðslu á, at vøksturin í elsøluni er um at minka niður í onki.
Tað er tó serstakliga vøksturin í oljuútreiðslunum, sum noyðir SEV at hækka elprísirnar frá 1. januar 2008.
Oljuútreiðslurnar eru hækkaðar úr 25,5 mió. kr. í 1999 til meira enn 70 mió. kr. í 2007. Hettar hevur SEV verið ført fyri at átaka sær, uttan at skula hækka elprísirnar. Men við eini oljuútreiðslu í 2008 upp á 103 mió. kr. ella kanska meira enn tað, verður tað hildið óforsvarligt ikki at hækka elprísirnar hartil, at javnvág verður í rakstrinum.

Fyri at avmarka elprísvøksturin er avgjørt at útseta viðlíkahaldsarbeiðir fyri milliónа upphæddir. Hettar eru útreiðslur, sum ikki kunnu sleppast undan í longdini, men kann ein seinking av teimum vera við til at gera elpríshækkingina minni í hesum umfarinum, og vónandi so, at framhaldandi oljupríshækkingar gerast minni ógvusligar og harvið avmarka tørvin á elpríshækkingum í komandi tíðum.

Høgu oljuprísirnir skunda eisini undir útbygging av varandi orkukeldum. Á íløguætlanini seru settar 35 mió. kr. av til vatnorkuútbygging, eins og peningur er settur av til bæði vind- og alduorkuætlanir. Niðanfyri er í stuttum greitt frá fortreytum og øðrum viðurskiftum, sum dentur er lagdur á í sambandi við áseting av teimum einstøku inntøku- og útreiðslubólkunum. Metingarnar fyri 2008 byggja m.a. á roknskapar- og framleiðslutøl teir fyrstu tíggju mánaðirnar av 2007.

## INNTØKUR

Avroknaða elsølan var í 2006 íalt 241,6 mió. kWh og framleiðslan var íroknað keypta vindorkuframleiðslu 259,5 mió. kWh. Eginnýtslan, tap í býtisvirkjum og forskjótingar í uppgerðartíðarskeiðum vóru sostatt tilsamans 6,9% av framleiðsluni í 2006.
Í 2007 verður roknað við 5 % størri elsølu enn árið fyri.

Harafturat verður bæði í 2007 og 2008 roknað við, at 7,6% av framleiðsluni fer til tap í býtisvirkjum og eginnýtslu. Hettar svarar til meðaltalið fyri seinastu 6 árini.
Framleiðsluhagtølini fram til og við oktober 2007 benda á, at stóri vøksturin, sum hevur verið í elnýtsluni í 2006 og fyrru helvt av 2007, nú er hasaður av og er kanska um at steðga upp.
Í rakstraræltlanini fyri 2008 verður sum grundarlag undir metingum um inntøkurnar roknað við, at samlaði nýtsluvøksturin verður 5% frá 2006 til 2007 og 2% frá 2007 til 2008.

Meðal avroknaði elprísurin var í 2006 uml. 91 oyru/kWh. Fyri bæði 2007 og 2008 verður roknað við hesum sama lutfalsliga býti millum teir ymisku kundaprísbólkarnar.

Út frá frammanfyri standandi verður elsølan í 2007 uml. 252 mió. kWh og verður inntøkan íroknað fast gjald, íbindingargjøld o.a. mett til 247,6 mió. kr.
Við 2% vøkstri í elsøluni og eini elpríshækking upp á 10 oyru/kWh fyri bæði vanligar kundar og ídnaðarprís-kundar verður roknað við, at samlaðu inntøkurnar verða uml. 278 mió. kr. í 2008.

# ÚTREIÐSLUR

**Rakstrarútreiðslurnar** eru ásettar út frá metingum um teir einstøku útreiðslubólkarnar. Hædd er tikið fyri avtalaðu lønarhækkingunum, so roknað verður við uml. 41,7 mió. kr. til lønir í rakstrinum í 2008 fyriuttan lønir undir fyrisiting (jbr. niðanfyri). Restin er tilfar og tænastuveitingar, herundir eykalutir til elverkini og kaðalar, transformarar o.a.m. til linjurakstur.
Avgjørt er at útseta nøkur viðlíkahaldsarbeiðir til 2009 ella seinni orsakað av, at raksturin hjá SEV verður tyngdur nógv í 2008 av skjótt vaksandi oljuprísum.

**Fyrisitingarútreiðslurnar** eru ikki bert til fyrisiting, men ein munandi partur av hesum útreiðslum fara til onnur endamál, m.a. eftirlønt starvsfólk, frammanundankanningar, tryggingar og arbeiðsmarknaðargjøld. Harafturat kemur tap upp á skuldarar og ymiskar felagsútreiðslur annars.
Tapið upp á skuldarar hevur verið lutfalsliga lágt seinastu árini. Í 2004 bert 0,2 mió. kr., í 2005 uml. 0,3 mió. kr. og í 2006 uml. 0,2 mió. kr. . Í rakstraræltlanini fyri 2008 eru avsettar 0,7 mió. kr. til tap upp á skuldarar.
Av samlaðu fyrisitingarútreiðslunum verður roknað við, at 10,3 mió. kr. fara til lønir, eftirlønir og samsýningar í 2008.

**Orkukeyp**

Roknað verður við, at SEV sambært avtalu við Sp/f Røkt í Vestmanna fer at keypa vindorkuframleidda elmegi upp á uml. 7,2 mió. kWh fyri 0,40 kr./kWh.
Hettar gevur eina útreiðslu til orkukeyp upp á uml. 2,9 mió. kr.
Hædd er tikin fyri hesum orkukeypi í framleiðsluni á Sundsverkinum og harvið sparing í oljuútreiðslum. Eisini er hædd tikin fyri, at vindorkan, sum SEV sjálvt framleiðir, verður 7,85 mió. kWh í 2008.

**Oljuútreiðslurnar verða í 2008 mettar at vera 103 mió. kr**. Tá er roknað við vøkstri í framleiðsluni sum nevnt frammanfyri. Roknað er við eini vatnorkuframleiðslu upp á 95 mió. kWh,

vindorkuframleiðslu uppá 7,85 mió. kWh og termiskari framleiðslu uppá 167,9 mió. kWh.
Harafturat er roknað við keyptari vindorkuframleiðslu upp á 7,2 mió. kWh.
Oljuprísirnir eru broyttir óvanliga nógv seinastu tvey árini, bæði upp og niður, tó mest uppeftir. Í seinastuni eru prísirnir komnir upp á tað hægsta nakrantíð.
Tað hjálpir tó nakað upp á prísstøðið, roknað í okkara gjaldoyra, at USD – kursurin er lækkaður nakað samstundis, men tó so lítið, at prísurin, sum SEV skal gjalda, er munandi hækkaður.
Út frá núverandi prísum og við atliti at prísgongdini seinastu tíðina verður mett, at SEV fer at brúka fyri 103 mió. kr. í olju í 2008. Hettar svarar til næstan 40% av øllum útreiðslunum hjá SEV. Tí fær tað stóra ávirkan á rakstrarúrslitið, um gongdin í oljuprísunum verður munandi annarleiðis enn tað, ið mett er í rakstraræatlanini.
Fyri at undirstrika týdningin av oljuprísshækkingini skal vísast á, at í 2005 brúkti SEV fyri 49,3 mió. kr. til oljukeyp svarandi til 24% av øllum útreiðslunum tað árið móti næstan 40 % í 2008.

**<u>Rentuútreiðslur</u>** og **<u>avdráttir</u>** av lánum eru mett út frá galdandi lániavtalum og metingum um rentubroytingar. Roknað er ikki við nakrari nýggjari lánitøku í 2008.
Íløgurnar í 2008 verða fíggjaðar av gjaldførinum og av rakstrarískoytinum.
Talan er um netto rentuútreiðslur, har rentuinntøka av tøka peninginum er við.

**<u>Avskrivingarnar</u>** verða ásettar eftir somu avskrivingarprosentum, sum brúkt eru í roknskapinum fyri 2006.
Í 2007 vera avskrivingarnar uml. 53,52 mió. kr. Millum íløgurnar, sum koma inn í avskrivingargrundarlagið í 2007, eru býtisvirkir fyri 40 mió. kr. og framleiðsluvirkir fyri uml. 3 mió. kr. Samstundis merkir frágongd úr avskrivingargrundarlagnum eina minking í avskrivingum upp á útvið. 16 mió. kr. Høvuðsorsøkin hertil er, at "Eiði 1" – vatnorkuútbyggingin verður liðugt avskrivað í 2006.
Í 2008 koma býtisvirkir fyri uml. 50 mió. kr. og framleiðsluvirkir fyri uml. 5 mió. kr. inn í avskrivingargrundarlagið. Samstundis er nakað av frágongd soleiðis, at <u>avskrivingarnar verða mettar til 50 mió. kr. í 2008</u>.

**<u>Íløgurnar</u>** eru settar til <u>114,9 mió. kr. í 2008</u>, herav 49,4 mió. kr. til framleiðsluvirkir (bæði til útbygging av vatnorku, vindorku og alduorku) og 49,7 mió. kr. til býtisvirkir, harav uml. 22 mió. kr. til nýggjan sjókaðal til Sandoyar.

Ávís óvissa er viðv. tíðaræatlanini fyri onkrar av ætlaðu íløgunum. Sum dømi kann nevnast, at til vatnorkuútbyggingina í Eysturoy "Eiði II" skulu loyvisgevandi myndugleikar, herundir byggimyndugleikar, friðingarmyndugleikar og lendiseigarar, hava ta tíð, teimum tørva til viðgerð av málinum. Málið hevur drigið út, í seinastuni serstakliga orsakað av árins- og umhvørviskanningum, sum Yvirfriðingarnevndin hevur álagt SEV.
Væntandi verður byrjað upp á norðrara part av verkætlanini innan komandi ársskifti og sunnara part til várs.

-------------------------------------

**Tórshavn í november 2007**

**Elfelagið SEV**

# RAKSTRARÆTLAN FYRI 2008 (í 1000 kr)

## INNTØKUR:

| Ætlan 2007: | | |
|---|---|---|
| 219.726 | Streymgjald | 258.554 |
| 15.100 | Fast gjald | 15.500 |
| 1.900 | Íbindingargjald | 2.000 |
| 1.200 | Ómaksgjøld v.m. | 2.000 |
| **237.926** | **Inntøkur** | **278.054** |

## ÚTREIÐSLUR:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 70.031 | **Olja til elverk og bygningar** | | **103.000** | |
| 3.000 | **Orkukeyp** | | **2.900** | |
| 71.363 | Rakstrarútreiðslur: | | | |
| | Framleiðsluv. v.m.,løn | 22.100 | | |
| | Framleiðsluv. v.m., tilfar og veitingar | 17.200 | | |
| | Bygningar, løn | 800 | | |
| | Bygningar, tilfar og veitingar | 7.650 | | |
| | **Framleiðsluv. og bygningar íalt** | | **47.750** | |
| | Býtisvirkir, løn | 19.600 | | |
| | Býtisvikrir, tilfar og veitingar | 16.800 | | |
| | **Býtisvirkir íalt** | | **36.400** | |
| | Fyrisiting v.m., løn | 10.300 | | |
| | Fyrisiting, tilfar og veitingar | 15.250 | | |
| 24.120 | **Fyrisiting íalt** | | **25.550** | |
| 5.900 | **Renta, netto** | | **4.100** | |
| 9.850 | **Eyka rakstrarútreiðslur** | | **10.000** | |
| 184.264 | | | | **229.700** |
| **53.662** | Úrslit áðrenn avskrivingar | | | **48.354** |
| 53.550 | **Avskrivingar, rakstrargøgn** | | **50.000** | |
| | | | | **50.000** |
| **112** | **Rakstrarúrslit** | | | **(1.646)** |
| ===== | | | | ====== |

# FÍGGJARÆTLAN FYRI 2008 (í 1.000 kr.)

## Ætlan 2007:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 53.662 | Gjaldførisískoyti frá rakstrinum | | 48.354 |
| (500) | Broyting, skuldarar | | (500) |
| 500 | Broyting, ognarar | | 500 |
| (2.000) | Broyting, goymslur | | (2.000) |
| 200 | Broyting, annað | | 200 |
| 51.862 | | | 46.554 |
| | | | |
| 74.545 | Íløgur | 114.900 | |
| 0 | Lántøkur | 0 | 114.900 |
| (22.683) | | | (68.346) |
| | | | |
| 19.100 | Goldnir avdráttir | | 19.100 |
| | | | |
| | | | (87.446) |
| | | | |
| 101.000 | Ágóði við ársbyrjan | | 113.000 |
| | | | |
| **59.217** | **Ágóði við ársenda** | | **25.554** |

# BYGGIÆTLAN 2008 (í 1.000 kr.)
## jbr. hjáløgdu útgreiningar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | 43.150 | Býtisvirkir | 49.700 |
| 2. | 17.120 | Framleiðsluvirkir | 49.400 |
| 3. | 7.075 | Bygningar o.a. | 6.800 |
| 4. | 7.200 | Nýútvegan, ymiskt | 9.000 |
| | **74.545** | | **114.900** |
| | ===== | | ====== |

# Byggiætlan 2008, útgreiningar

| **Ad 1. Býtisvirkir:** | | **(1000 kr.)** |
|---|---|---|
| 1. | Jbr. hjáløgdu útgreining | **49.700** |
| | | ===== |

**Ad 2. Framleiðsluvirkir:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Vatnorkuútbygging, Eiði 2-verkætlanin | 35.000 |
| 2. | Vindorkuútbygging | 1.000 |
| 3. | Alduorka | 8.000 |
| 4. | Elverk, ymiskt og smáverk v.m. jbr. hjáløgdu útgreining | 5.900 |
| | **Íalt** | **49.400** |
| | | ===== |

**Ad 3. Bygningar, o.a.:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Háspeningsútgerð á verkinum í Trongisvági og magnetisering | **6.800** |
| | | ===== |

**Ad 4. Nýútvegan, ymiskt**:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Amboð | 1.000 |
| 2. | Málitól | 200 |
| 3. | Innbúgv | 700 |
| 4. | Samskiftisútgerð | 100 |
| 5. | Fjarstýring | 100 |
| 6. | Akfør | 1.400 |
| 7. | EDV | 3.000 |
| 8. | Fjaravlestur, málarar | 2.500 |
| | **Íalt** | **9.000** |
| | | ===== |

| **Býtisvirkir, íløgur 2008:** | **(í 1.000 kr.)** |
|---|---|
| Býtisvirkir | 2.300 |
| Há- og lágspenning, trafostøðir v.m. | 15.000 |
| Projektering | 0 |
| Teknistovan | 419 |
| 60 kV | 200 |
| Ymiskt, kaðal- og linjumeistarar | 1.000 |
| Goymsla v.m. | 0 |
| Innleggingar | 180 |
| Eltøkni | 5.955 |
| Sjókaðal | 22.000 |
| 60 kV reaktans | 2.500 |
| Ymiskt | 146 |
| **Íalt** | **49.700** |
| | ===== |

| **Framleiðsluvirkir, íløgur 2008:** | **(í 1.000 kr.)** |
|---|---|
| Sundsverkið | 4.245 |
| Suðuroy | 845 |
| Smáverk | 400 |
| Vestmanna og Eiði | 220 |
| Maskindeildin | 190 |
| **Íalt** | **5.900** |

## GJALDSKRÁ GALDANDI FRÁ 1. JANUAR 2008 (uttan MVG):

| **Brúkarastødd** (kWh/ár): | **Fast gjald** (kr./ár): | **Nýtslugjald** (kr./kWh): |
|---|---|---|
| Upp til 10.000 | **480,00** | **1,21** |
| 10.000 til 100.000 | **1.280,00** | **1,13** |
| yvir 100.000 | **5.280,00** | **1,09** |

## ÍDNAÐUR, FISKIVINNA, LANDBÚNAÐUR V.M. SAMBÆRT VINNUGREINASKIPANINA HJÁ SEV:

| **Brúkarastødd** (kWh/ár): | **Fast gjald** (kr./ár): | **Nýtslugjald** (kr./kWh): |
|---|---|---|
| Upp til 10.000 | **480,00** | **1,21** |
| 10.000 til 20.000 | **1.280,00** | **1,13** |
| yvir 20.000 | **9.080,00** | **0,74** |